# Fyrisagnarhefti



## Skúlin við Løgmannabreyt

*(Fyrisagnirnar eru úr bókini "Hervør og Høgni í triðja")*

**Soleiðis arbeiða vit við fyrisagnunum:**

1) Set prikk undir øll sjálvljóðini og tvíljóðini.
2) Být orðini í stavilsir.
3) Les fyrisøgnina ígjøgnum.
4) Skriva hvørt staviorð av tríggjar ferðir í skriviheftið.
5) Lesa upp á fyrisøgnina heima.
6) Skriva fyrisøgnina í skúlanum sum upplestur í skriviheftið.

**Góð ráð annars:**

1) Brúka ein blýant við **spískari** stift.
2) Hugsa um, hvar bókstavirnir **búgva**.
3) **Stórur bókstavur** verður altíð skrivaður aftan á punktum, nøvn (á fólki, býu, landum og annars staðarnøvn), tá ein byrjar at skeiva eina yvirskrift ella setning.
4) **Lítil bókstavur** verður altíð skrivaður aftan á komma.
5) Lesi fyrisøgnina væl ígjøgnum, tá hon er liðugt skrivað.

## Fyrisøgn 1

Tá ið Una kom heim úr skúla, fór hon at fáa sær at eta. Mamma var har, so hon og Una ótu báðar. Tær ótu breyð. So fór Una út at spæla við Vár. Tær fóru út at spæla við eina á, sum rann har. Tær vóru har, til tað var heilt seint.

***Staviorð:*** *skúla, at, fáa, var, har, hon, báðar, breyð, spæla, við, rann, tað, heilt, seint.*

## Fyrisøgn 2

Høgni og Óli eru so góðir vinir. Teir spæla so ofta, tað ber til. Teir spæla við teldu, og so sparka teir bólt. Høgni hevur ein hund, sum eitur Snar, og so hevur hann eisini eina kettu, sum eitur Kiskan. Høgni er beiggi Hervør, og tey bæði eru 8 ár.

***Staviorð:*** *góðir, sparka, eitur, Snar, eisini, kettu, Kiskan, beiggi, bæði.*

## Fyrisøgn 3

Hervør er eisini 8 ár. Hon er systir Høgna. Hervør dámar so væl at lesa, hon lesur nógvar bøkur. Nú dugir hon at lesa sjálv, men fyrr mátti mamma ella pápi lesa hart fyri henni. Tá ið Hervør ikki dugir at lesa eitt orð, so stavar hon tað hart, og so gongur betur. Hervør eigur nógvar bøkur.

***Staviorð:*** *eisini, systir, dámar, nógvar, bøkur, dugir, sjálv, fyrr, henni, orð, stavar, eigur.*

## Fyrisøgn 4

Virgar er 9 ár. Honum dámar so væl at spæla við teldu, og hann er eisini ofta úti og sparkar bólt. Ein dagin, tá ið hann var úti, datt hann um ein stein og fekk ilt í beinið. Tað bløddi nokk so illa, men so fekk hann plástur á beinið, so bløddi tað ikki meiri, og so græt Virgar ikki longur.

***Staviorð:*** *Virgar, honum, dámar, eisini, sparkar, dagin, beinið, bløddi, illa, plástur, ikki, longur.*

## Fyrisøgn 5

Tá ið Vár var lítil búði hon í Somalia, men nú býr hon her. Vár hevur ein lítlan beiggja, sum eitur Páll. Tá ið Páll var lítil, búði hann í India. Vár hevur nógvar vinir, men henni dámar best at spæla við Hervør og Høgna. Vár dugir væl at dansa, tað er so stuttligt, heldur hon.

***Staviorð:*** *Somalia, býr, lítlan, beiggja, búði, India, nógvar, henni, dugir, stuttligt.*

## Fyrisøgn 6

Einar hevur ein beiggja, sum eitur Pól. Pól býr hjá pápa, og Einar býr hjá mammu, men tey eru ofta saman øll fýra. Pápi Einar er bóndi, hann hevur nógvan seyð. Einar heldur, at tað er stuttligt at vera hjá pápa, tí ofta fara teir í hagan. Har er nógv at síggja. Teir síggja harur og fuglar og nógvan seyð.

***Staviorð:*** *Einar, beiggja, býr, fýra, nógvan, seyð, stuttligt, hjá, fara, hagan, síggja, fuglar.*

## Fyrisøgn 7

Kristina hevur fingið ein lítlan beiggja. Hann er so fittur. Kristina er so góð við hann. Kristina dugir væl at tekna, hon teknar nógvar myndir til hansara. Mamma tekur tær og goymir tær í eini mappu. Beiggi skal fáa tær, tá ið hann verður størri, sigur mamma. Enn er hann so lítil, men hann veksur skjótt.

***Staviorð:*** *Kristina, fingið, lítlan, beiggja, fittur, góð, dugir, myndir, hansara, goymir, mappu, beiggi, størri, veksur, skjótt.*

## Fyrisøgn 8

Pápi Óla er farin at arbeiða heima. Tað er gott, heldur Óli, tí so er pápi heima, tá ið Óli kemur úr skúla. Pápi og Óli ganga ofta túr. Teir koyra lítlabeiggja hjá Óla í vogni. Lítlibeiggi eitur Tórður, hann er nokk so stórur nú, hann er eldri enn beiggi Kristinu. Kanska fara teir at ganga í sama flokki, tá ið teir fara í skúla, sigur Óli við Kristinu.

***Staviorð:*** *farin, arbeiða, heima, kemur, lítlabeiggja, Tórður, nokk, beiggi, Kristinu, kanska, sigur.*

## Fyrisøgn 9

Tróndur hevur verið úti og fiskað við pápa sínum. Pápi Trónd er við einum stórum trolara. Tróndur helt tað vera stuttligt at vera til skips. Men hann hevði sjóverk í tveir dagar, tí tá var ringt veður. Men so gekk betur, tí tað bleiv gott veður. Ein annar drongur var eisini við. Pápi hansara var eisini við sama skipi.

***Staviorð:*** *Tróndur, verið, fiskað, sínum, stórum, trolara, stuttligt, skips, sjóverk, dagar, gekk, veður, eisini, hansara, skipi.*

## Fyrisøgn 10

Ein dagin, tá ið Sjúrður fór til fótbólt, sá hann ein stóran hund. Sjúrður er eitt sindur bangin fyri hundum, so hann visti ikki, hvat hann skuldi gera. Men so kom ein  maður har. Hann segði við Sjúrð, at hetta var hansara hundur, og tað var ein sera fittur hundur, sum ikki beit. Sjúrður fór yvir til hundin at klappa honum.

***Staviorð:*** *dagin, Sjúrður, fótbólt, bangin, hundum, visti, hvat, maður, segði, hansara, beit, yvir, klappa, honum.*

## Fyrisøgn 11

Sofía hevur búð í Íslandi. Tað er stutt síðan, at hon kom her at búgva. Omma Sofíu býr enn í Íslandi, og Sofía fer at vitja hana í summar. Tað gleðir Sofía seg til, tí hon hevur eisini nógvar vinir í Íslandi. Sofía er deyv, so øll í hennara nýggja flokki eru farin at læra seg teknmál, so tey kunnu tosa við Sofíu.

***Staviorð:*** *Sofía, búð, stutt, síðan, búgva, býr, Ísland, vitja, summar, gleðir, eisini, hennara, nýggja, flokki, farin, teknmál, kunnu.*

## Fyrisøgn 12

Tá ið Eyðfinnur sparkar fótbólt við sínum liði, er hann bakkur. Tað er ikki so stuttligt sum at vera har frammi, men Eyðfinnur sigur, at tað er sera gott at hava ein góðn bakk, tí hann kann eisini verja málið. Teir vinna ofta, tá ið teir sparka. Ofta fara teir til Havnar ella onkra aðra bygd at sparka. Tað er stuttligt, heldur Eyðfinnur, tí tá lærir hann nógv fólk at kenna.

***Staviorð:*** *Eyðfinnur, sparkar, fótbólt, sínum, liði, bakkur, stuttligt, frammi, góðan, verja, málið, vinna, bygd, stuttligt, fólk, kenna.*

## Fyrisøgn 13

Tá ið Drós fer til fimleik, fer mamma hennara ofta við. Mamma ger eisini fimleik, men hennara lið venur seinni um kvøldið. So bíðar Drós eftir mammu, og hon heldur, at tað er stuttligt at hyggja eftir mammu og teimum, tí tær duga væl, hóast tær ikki eru heilt ungar. “Eg hyggi fyrst eftir tær, so hyggur tú eftir mær,” sigur mamma.

***Staviorð:*** *Drós, fimleik, hennara, eisini, lið, seinni, kvøldið, bíðar, hyggja, eftir, teimum, duga, hóast, hyggi, fyrst, hggur, sigur.*

## Fyrisøgn 14

Anna Maria hevur ein hund, sum eitur Flekk. Anna Maria hevur fingið hundin frá einum manni, sum býr í Havn. “Hetta er ein so góður hundur,” segði maðurin, tá ið Anna Maria var eftir Flekk. “Tað er eisini rætt,” sigur Anna Maria. “Flekk er ein fittur og góður hundur, sum ikki ger nakað um seg.” Anna Maria fer túr við Flekki hvønn dag, tí ein hundur skal røra seg, um hann ikki skal keða seg.

***Staviorð:*** *Anna Maria, Flekk, fingið, einum, segði, maðurin, nakað, Flekki, hvønn, skal, keða.*

## Fyrisøgn 15

Rannvá hevur nógvar vinir. Tá ið hon kemur heim úr skúla, sendir hon sms til Sofíu ella onkran annan og biður tey koma at spæla. Tey spæla ofta heima hjá Rannvá. Tey spæla ofta teldu, men tey fara eisini ofta út at hoppa band, tá ið veðrið er gott. Rannvá dugir væl at tosa teknmál við Sofíu. Hanna hevur lært allan flokkin at tosa teknmál, og Sofía hevur eisini lært Rannvá nógv tekn.

***Staviorð:*** *Rannvá, kemur, Sofíu, onkran, biður, hjá, veðrið, dugir, teknmál, flokkin, eisini, lært, nógv, tekn.*